FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Postboks 208
110 Tórshavn

Stjórnarskrivstovan
3. juli 2020
Mál: 20/00298-3
(at tilskila í svari)

Svar til § 52a fyrispurning nr. 120/2019 frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni

Fyrispurningur um virði av kvotum latin til reiðarí í nýggju sjófeingislógini, settur landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvussu stórt er metta árliga avreiðingarvirðið (bygt á miðal avreiðingarvirði 2015-2019) av teimum 20.000 tonsunum av norðhavssild, sum tey fýra størstu reiðaríini fingu sum eginkvotu afturat við broytingini í sjófeingislógini 1. januar 2020?
2. Hvussu stórt er metta árliga avreiðingarvirði av teimum tonsum av norðhavssild, sum tey reiðarí, ið keyptu 3 og 8 ára rættindi í 2018 og 2019, fáa afturat við lógarbroytingini, ið er skotin upp í tingmáli 142/2019?
3. Hvør er sakliga og fyrisitingarliga grundgevingin fyri, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur skotið upp hesar báðar lógarbroytingar?
4. Hvussu nógv hevði uppboðssølan givið landskassanum av ávikavist uppsjóvarfiski og botnfiski í Barentshavinum í 2020, um lógin ikki varð broytt, og um miðalprísurin varð tann sami sum í 2019?
5. Hvussu nógva kvotu í tonsum hava tey einstøku reiðaríini av botnfiski í Barentshavinum við nýggju lógini í 2020 – og hvussu stórt er avreiðingarvirðið við miðalprísum frá 2015-2019.
6. Hvussu stóra kvotu í tonsum og virði høvdu hesi somu reiðarí í Barentshavinum í 2005?
7. Hvussu stóra kvotu av botnfiski í Barentshavinum hava tey skip, ið hava mest í ávikavist Noregi og Russlandi í 2020?
8. Hvussu nógva kvotu hava tey fýra størstu reiðaríini av makreli, norðhavssild og svartkjafti (harundir feløg, ið tey eiga part av) í 2020, og hvat er avreiðingarvirðið av hesum við miðalprísum frá 2015-2019).
9. Hvussu stóra kvotu av somu fiskasløgum høvdu hesi fýra størstu reiðaríini í 2009?
10. Hvussu stóra kvotu hava tey størstu reiðaríini árliga í ávikavist Noregi og Íslandi av somu fiskasløgum í 2020?

Ministry of Fisheries

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

11. Hvussu nógv avreiðingarvirði hevur útróðrarflotin (bólkur 4 a og b og bólkur 5 a og b) fingið av uppsjóvarfiski frá 2009-2019?

Svar:

Til spurning 1

Miðal avreiðingarprísurin fyri árini 2015-2019 er roknaður við støði í upplýsingum, sum liggja á www.vorn.fo. Tilskilað er ikki, hvørt avreiðingarnar eru frá virkaðari vøru ella óvirkaðari.

Fiskaslag	*tons*	*kr/kg 2015-2019*	*Mett avreiðingarvirði*
Norðhavssild	20.000	4,63	92.600

Til spurning 2

Lógarbroytingin í løgtingsmáli nr. 142/2019 viðvíkjandi hvussu uppboðssølukvoturnar, ið vórðu keyptar í 2018 og 2019 við 3 og 8 ára gildistíð, hevur við sær, at 1.260 tons verða meir at lata teimum rættindahavarum, ið keyptu hesi rættindini. Verður roknað við miðal avreiðingarprísinum fyri árini 2015-2019, samsvarar tað við 5,834 mill. kr.

Fiskaslag	*tons*	*kr/kg 2015-2019*	*Mett avreiðingarvirði*
Norðhavssild	1.260	4,63	5.834

Til spurning 3

Í uppskotinum til løgtingslóg um sjófeingi (løgtingsmál nr. 15/2019) var skotið upp, at markið í § 14, stk. 1, nr. 3 skal vera 65.000 tons. Undir viðgerðini í Løgtinginum varð hetta markið, eftir uppskoti frá minnilutanum í Vinnunevndini (samgonguumboðini) hækkað til 85.000 tons; (lógartilvísingin varð samstundis broytt til § 15, stk. 1, nr. 3). Løgtingið tók undir við hesi broyting.

Í viðmerkingunum til broytingina vísir Vinnunevndin á: "Ein onnur broyting í mun til upprunauppskotið er, at lagt verður upp til, at markið fyri norðhavssild verður hækkað úr 65.000 tons upp í 85.000 tons. Við hesi broyting verða tær nøgdir, sum í upprunauppskotinum skulu seljast, men við hesum uppskotinum partvíst verða lagdar um til vinnuligar royndir og verkætlanir, minni."

Í løgtingsmáli nr. 142/2019 verður greitt frá og grundgivið fyri, hví skotið verður upp at broyta ásetingarnar í § 9, stk. 1, 1. og 2. pkt. Endamálið er at javnseta rættindahavararnar, ið á uppboðssølum í 2018 og 2019 keyptu kvoturættindi av norðhavssild við 3 og 8 ára gildistíð, við teir rættindahavarar, ið frammanundan hava eginkvotur av norðhavssild, tá rættindini hjá hvørjum av hesum skulu stillast eftir heildarkvotuni/markinum. Her verður endurgivið, hvat verður ført fram í viðmerkingunum:

"**Til nr. 1**
§ 9, stk. 1, 1. og 2. pkt.

Í løgtingsmáli nr. 15/2019, uppskot til løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin), samtykti Løgtingið eitt broytingaruppskot frá Vinnunevndini, so at markið fyri norðhavssild (í § 15) varð broytt frá 65.000 tonsum til 85.000 tons. Hetta hevði við sær, at størri nøgd er at luta út til tey, ið søguliga hava havt rætt at fiska norðhavssild. (broyting nr. 17).

Men tað hevur eisini havt við sær, at spurningur seinni hevur tikið seg upp, um tey, sum í 2018 og 2019 hava keypt sær uppboðssølukvotu, eiga at fáa lut í hesi hækking.

Av tí, at bygnaðurin er soleiðis, at 3 og 8 ára rættindini verða løgd um til egnar kvotur og fáa støðu sum aðrar egnar kvotur eftir lógini, og av tí, at lógin annars leggur upp til, at kvoturnar frameftir skulu flyta seg eins við broytingum í heildarkvotuni, eiga egnu kvoturnar og uppboðssølukvoturnar at verða javnsettar og skulu fyrihalda seg til somu mørk.

Broytingin leggur tí upp til, at 3 og 8 ára rættindini í 2020 verða útlutað við støði í ásetingunum í § 19, stk. 5 í undanfarnu lóg (løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi), men at nøgdirnar verða stillaðar soleiðis, at markið fyri norðhavssild er 85.000 tons og ikki 65.000 tons. Samstundis verður ásett, at gjøld fyri kvoturnar eru bert av teimum nøgdum, sum keyptar eru sambært undanfarnu lóg. Tær nøgdir, sum verða tillutaðar við støði í hækkaða markinum, verða sostatt ikki álagdar uppboðssølugjaldið, men tær vera ístaðin fevndar av ásetingunum um veiðigjald í løgtingslóg um serstakar treytir.

Mett verður, at broytingin fer at gera umsitingina greiðari og gjøgnumskygdari við atliti at, hvussu kvoturnar seinni flyta seg, tá heildarkvotan broytist."

Til spurning 4

Var uppboðssølan fyriskipað sambært lógini um fyrisiting av sjófeingi, og roknað verður við miðalprísunum frá uppboðssølunum í 2019, hevði sølan givið 226,1 mill. kr. Niðanfyri er eitt yvirlit yvir nøgdir, ið høvdu verið seldar, miðal søluprísir í 2019 og mett søluvirði fyri hvørt fiskaslag sær og samanlagt.

Fiskaslag	***tons***	***kr/kg 2019***	***Mett avreiðingarvirði***
Botnfiskur í Barentshavinum	4.045	7,19	29.084
Makrelur	12.242	6,62	81.042
Norðhavssild	35.847	2,41	86.391
Svartkjaftur	70.455	0,42	29.591
Tilsamans			**226.108**

Til spurning 5

Kvoturnar, sum tey trý reiðaríini (P/F JFK Trol, P/F Enniberg og P/F Akraberg FD 10) í 2020 hava at fiska í Barentshavinum (norskum sjógvi, við Svalbard og í russiskum sjógvi) hvørt reiðarí sær, eru lagdar saman fyri tær tríggjar leiðirnar. Talan er um eginkvoturnar, sum reiðaríini fáa tillutað undantikin kvoturættindini, sum tey hvørt sær hava keypt á uppboðssølu seinastu árini. Møgulig loyvd hjáveiða er ikki íroknað.

Miðalprísirnir eru roknaðir grundað á avreiðingarvirði sambært upplýsingum á www.vorn.fo og upplýsingar frá Vørn um faktiska veiðu sambært fráboðanarskipanini.

Kvotur og avreið.virði í Barhav 2020	tons	kr/kg 2015-2019	Mett avr.virði
P/F JFK Trol			
Toskur	9.639	16,89	162.803
Hýsa	1.169	12,4	14.496
Hvassasprek	150	12,37	1.856
Annað	574	7,52	4.316
			183.470
P/F Enniberg			
Toskur	4.820	16,89	81.410
Hýsa	585	12,4	7.254
Hvassasprek	75	12,37	928
Annað	287	7,52	2.158
			91.750
P/F Akraberg FD 10			
Toskur	6.330	16,89	106.914
Hýsa	742	12,4	9.201
Hvassasprek	615	12,37	7.608
Annað	352	7,52	2.647
			126.369

Til spurning 6

Kvoturnar, sum tey trý reiðaríini (P/F JFK Trol, P/F Enniberg og P/F Akraberg FD 10) í 2005 høvdu at fiska í Barentshavinum (norskum sjógvi, við Svalbard og í russiskum sjógvi) hvørt reiðarí sær, eru lagdar saman fyri tær tríggjar leiðirnar. Møgulig loyvd hjáveiða er ikki íroknað. Roknað er við somu miðalprísum sum undir svarinum til spurning 5).

Kvotur og avr.virði í Barhav. 2005	tons	kr/kg 2015-2019	Mett avr.virði
P/F JFK Trol			
Toskur	6.313	16,89	106.627
Hýsa	911	12,4	11.296
Flatfiskur	230	12,37	2.845
Annað	680	7,52	5.114
			125.882
P/F Enniberg			
Toskur	3.157	16,89	53.322
Hýsa	455	12,4	5.642
Flatfiskur	115	12,37	1.423
Annað	340	7,52	2.557
			62.943
P/F Akraberg FD 10			
Toskur	4.613	16,89	77.914
Hýsa	667	12,4	8.271
Flatfiskur	655	12,37	8.102
Annað	529	7,52	3.978
			98.265

Til spurning 7

Tað er skipið m/s Gadus, sum hevur størst kvotur av botnfiski í bæði russiskum sjógvi og í norskum sjógvi – í norskum sjógvi 3.122 tons og í russiskum sjógvi 7.522 tons.

Til spurning 8

Yvirlitið niðanfyri vísir, hvørjar eginkvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti tey fýra størstu reiðaríini hava í 2020. Við í kvoturnar er eisini roknaðar tann lutfalsligi parturin av eginkvotunum, samsvarandi tann partin, sum hesi reiðaríini eiga í øðrum feløgum. Kvotur, ið eru keyptar á uppboði, eru ikki við í yvirlitinum.

Miðal avreiðingarprísurin fyri árini 2015-2019 er roknaður við støði í upplýsingum, sum liggja á www.vorn.fo. Tilskilað er ikki, hvørt avreiðingarnar eru frá virkaðari vøru ella óvirkaðari vøru.

Uppsjóvarkvotur 2020 - eginkvotur undantiknar kvotur keyptar á uppboðssølu	**tons**	**kr/kg 2015-2019**	**Mett avreiðingarvirði**
P/F Varðin			
Makrel	20.482	7,06	144.603
Norðhavssild	32.033	4,63	148.313
Svartkjaftur	68.692	1,83	125.706
	121.207		**418.622**
Sp/f Framherji			
Makrel	10.276	7,06	72.549
Norðhavssild	14.561	4,63	67.417
Svartkjaftur	45.654	1,83	83.547
	70.491		**223.513**
P/F Palli hjá Mariannu			
Makrel	10.485	7,06	74.024
Norðhavssild	20.385	4,63	94.383
Svartkjaftur	45.655	1,83	83.549
	76.525		**251.955**
P/F Næraberg			
Makrel	697	7,06	4.921
Norðhavssild	-	4,63	-
Svartkjaftur	48.613	1,83	88.962
	49.310		**93.883**

Til spurning 9

Yvirlitið niðanfyri vísir tær kvotur, sum tey 4 feløgini, ið umrødd eru í svarinum til spurning 8, høvdu í 2009 av somu kvotum.

Uppsjóvarkvotur í 2009	**tons**
P/F Varðin	
Makrel	8.599
Norðhavssild	37.815
Svartkjaftur	19.887
Sp/f Framherji	
Makrel	3.711
Norðhavssild	17.189
Svartkjaftur	15.136
P/F Palli hjá Mariannu	
Makrel	5.139
Norðhavssild	24.064
Svartkjaftur	14.833
P/F Næraberg	
Makrel	0
Norðhavssild	0
Svartkjaftur	16.571

Til spurning 10

Fiskimálaráðið hevur ikki yvirlit yvir, hvørjar kvotur norsk og íslendsk reiðarí hava.

Til spurning 11

Útróðrarflotin er skrásettur at hava avreitt tilsamans 31 tons av makreli árini 2009 til 2019. Hesar upplýsingar eru grundaðar á skrásetingar tøkar á www.vorn.fo undir avreiðingarseðlar. Útróðrarflotin er ikki skrásettur at hava avreitt norðhavssild og svartkjaft. Yvirlitið niðanfyri vísir tær felagskvotur, sum útróðrarflotin sambært kunngerðum hevur kunnað fiskað av. Avreiðingarvirðið er gjørt upp grundað á miðal avreiðingarprísin á makreli árini 2015-2019.

Útróðrarflotin kvotugrundarlag og skrásett avreiðingarvirði av makreli					
Ár	Kvota tons	kr/kg	Mett møguligt avr. virði	Fiskað tons	Avreiðingar-virði (kr)
2009		7,06	-	6	42.360
2010		7,06	-	2	14.120
2011	41.450	7,06	292.637	1	7.060
2012	3.000	7,06	21.180	7	49.420
2013	2.000	7,06	14.120	0	-
2014	1.400	7,06	9.884	0	-
2015	725	7,06	5.119	0	-
2016	553	7,06	3.904	1	7.060
2017	812	7,06	5.733	1	7.060
2018	546	7,06	3.855	0	-
2019	399	7,06	2.817	13	91.780

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður